# Bragi inn í 21. øld




**Fyrsta útgávan av braga í ár er á tremur við áhugaverdum greinum og ummælum**

MENTAN
*Turið Kjølbro*

At kunna og leiðbeina lesaran um tað forvitnisliga í bókmentaheiminum er tann krevjandi og spennandi uppgávan hjá braga, ið er føroyskt tíðarrit fyri bøkur og mentan. Eitt sovorðið tíðarrit er ein ómissandi táttur í røktini av føroyskari bókligari mentan, til at tryggja, at hon framvegis verður livandi ogn okkara, og at hon ikki trænar og stirðnar, sigur Turið Sigurðardóttir, lektari á Fróðskaparsetri Føroya, í oddagreinini í braga.

Í nýggjastu útgávuni av braga eru viðgerðir av nýggjari og eldri bókmentum. Anne-Kari Skarðhamar, bókmentafrøðingur, hevur skrivað grein um náttúruskaldskapin hjá Christiani Matras undir heitinum meginmáttur, sjálvtasæla, skapandi friður. Greinin lýsir lyndi og hugsanir í náttúrulýrikki Christians, sum vísa, at skaldskapur hansara er ávirkaður av og hevur fingið íblástur av føroyskari náttúru, men hevur nógv víðari og djúpari sjónarhorn enn tað føroyska.

Katrin Næs ummælir metsøluskaldsøguna Anna, Hanna og Jóhanna eftir Marianne Fredriksson, sum Jákup í Skemmuni hevur týtt, Jóan Petur Ludvig ummælir Aftur á slóðina eftir Aksel Sandemose, sum Hans Thomsen týddi, Andrias Justesen ummælir Tann bráðvakra hugsjónin, ið er savn við greinum og fyrilestrum eftir Hanus Kamban, Bergur Rasmussen ummælir Sangir til frælsi, ið er minnisfløga til Bjørn Afzelius, Bergur Rasmussen ummælir Harry Potter eftir Joanne K. Rowling, sum Gunnar Hoydal hevur týtt, og Marna Jakobsen ummælir Hvør av øðrum, sum er doktararitgerð eftir Maluna Marnersdóttir.

Turið Sigurðardóttir skrivar grein um yrkingasøvnini hjá Jóanes Nielsen, og Firouz Gaini, antropologur, skrivar grein við heitinum oyggjarnar aftur til Keypmannahavnar. Katrin Næs umrøður virðislønina innan bókmentir sum Jhumpa Lahiri hevur fingið. Kinna Poulsen hevur samrøðu við Hanna Bjartalíð, listamann, og Høgni Iversen skrivar grein um skaldsøguna og høvuðspersónin Huckleberry Finn. Umframt eru aðrar greinir og onnur ummæli í ritinum.

Fýra stjórna braga. Tey eru René Hjelm, Firouz Gaini, Bergur Rasmussen, og Willam Heiberg. Myndina á kápuni hesa ferð hevur Hanni Bjartalíð gjørt.

# Fólkaskúlin skal hava fleiri pengar



*- Næstu fýra-fimm árini er umráðandi, at vit gera okkum greitt, hvørji viðurskifti í nýggju fólkaskúlalógini skulu raðfestast fyrst, sigur Óli Holm, landsstýrismaður*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**- Eg vóni, at tað eydnast mær at útvega fólkaskúlanum so mikið stóra játtan í komandi fíggjarlóg, at trupulleikarnir í skúlanum, sum hava verið frammi seinastu árini, verða loystir, sigur Óli Holm, landsstýrismaður**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

Fólkaskúlin er framvegis í trongum skóm hóast kreppuárini eru av. Hann verður framvegis ikki raðfestur so høgt, at hann megnar at liva upp til krøvini í nýggju fólkaskúlalógini. Og einki bendir á, at karmarnir, ið lógin leggur upp til, verða fyltir í bræði. Hetta tekur alt tíð, sum nýggi landsstýrismaðurin í mentamálum, Óli Holm, tekur til, men stendur tað til hann fær fólkaskúlin størri játtan á komandi fíggjarlóg.

- Ynskiligt er, at fólkaskúlin fær so mikið størri játtan, at trupulleikarnir í føroyska skúlanum, sum hava verið frammi seinastu árini og ikki minst í seinastuni, verða loystir og at hann klárar at fylgja teimum ásetingum, sum eru í lógini. Skúlin tørvar eina munandi størri játtan, og eg vóni, at tað eydnast mær at útvega eina hægri játtan, sigur Óli Holm.

Á hvørjum ári søkir Sernámsdepilin vegna skúlarnar kring landið Mentamálastýrið eftir tímum til næmingar við serligum tørvi. Til komandi skúlaár varð biðið um gott og væl 2500 tímar. Tá ið avtornaði gjørdist kvotan slakir 1200 tímar. Eingin skúli hevur fingið tað biðið er um, nógvir næmingar hava ongar tímar fingið, aðrir alt ov fáar tímar, hóast allar umsóknirnar til serligan tørv eru væl grundaðar sambært virkandi stjóra á Sernámsdeplinum.

- Eingin ivi er um, at tímarnir til serligan tørv eru alt ov fáir. Men játtanin til fólkaskúlin er á einum støði sum ger, at tað er ógjørligt at útvega fleiri tímar til serligan tørv. Løgtingið hevur sagt, at fólkaskúlin fær ikki fleiri pengar at ráða yvir í hesum fíggjarárinum. Til komandi fíggjarlóg fari eg at royna at gera alt eg kann fyri at útvega størri játtan til serligan tørv. Øll kunnu verða samd um, at støðan als ikki er nøktandi.

Hvussu stór umbønin frá fólkaskúlanum verður næsta ár til serligan tørv, vita vit ikki enn, men landsstýrismaðurin slær fast, at tímatalið skal økjast. Hvussu nógv torir hann ikki at geva eitt boð uppá.

Fólkaskúlin er fyri øll børn uttan mun til brek ella tørv, men skúlin megnar ikki at liva upp til hetta sum viðurskiftini eru, kunnu lærarar, fakfólk, foreldur og onnur ásanna. Lógin er nóg góð, prinsippið somuleiðis, men pengarnir vanta at fylla karmarnar út, sigur landsstýrismaðurin.

- Hetta er neyðugt at arbeiða við í komandi tíðum. Lógin fevnir sera vítt, og nøkur viðurskifti ber ikki til at loysa eftir fáum árum. Næstu fýra-fimm árini er umráðandi, at vit gera okkum greitt, hvørji viðurskifti skulu raðfestast fyrst.

Skúlastjórar, Sosialurin hevur tosað við, vísa allir á, at tað hevur bráðskund at fáa eitthvørt sertilboð til næmingar sum so ella so fella uttan fyri skúlan. Hesir fáa ikki ta undirvísing teimum tørvar, tí skúlin vantar orku, og summir næmingar krevja so mikið, at aðrir næmingar fáa minni undirvísing. Royndir eru gjørdar í Føroyum við at taka næmingar úr flokkunum í ein serflokk, men tað sum skúlastjórarnir eftirlýsa er eitt sertilboð til hesar næmingarnar, har orkan fylgir við. Óli Holm kennir hesar trupulleikarnar frá sínum drúgvu royndum sum lærari.

- Nógv bendir á, at trupulleikarnir við næmingum sum hava trupulleikar verða størri og størri. Um vit skulu gera eitt sertilboð ella serflokkar, er ein spurningur, vit kunnu taka upp. Ein møguleiki er so at gera serflokkar har tveir-tríggir lærarar eru knýttir til. Men eisini her snýr tað seg um pengar.



*Fólkaskúlin er fyri øll børn uttan mun til brek ella tørv, men skúlin megnar ikki at liva upp til hetta sum viðurskiftini eru, kunnu lærarar, fakfólk, foreldur og onnur ásanna*
*Savnsmynd*



Olaf Olsen endurnýggjar flotan:

# Byggingin byrjar fyrsta dagin

**Olaf Olsen, reiðari, arbeiðir í løtuni við at byggja tveir nýggjar trolarar á skipasmiðju í Spania. Byrjað verður eina av fyrstu døgunum, eftir at seinastu smálutirnir eru komnir uppá pláss**




*Olaf Olsen væntar, at spanska skipasmiðjan fer undir bygging av nýggjum trolarum fyrsta dagin Mynd: Jens Kr. Vang*

SKIPABYGGING
*Stefan í Skorini*

Um eitt ár fer Olaf Olsen, reiðari á Beta Fish, at hava tveir nýggjar trolarar í reiðarínum. Hann sigur, at byggingin av teimum nýggju trolarunum byrjar heilt skjótt.

– Tað eru nakrar smávegis broytingar, sum skulu fáast uppá pláss, áðrenn byggingin kann fara í gongd, sigur Olaf Olsen, sum væntar, at trolararnir vera klárir at flota um eitt ár.

Teir hava havt brævasamskifti við skipasmiðjuna í Spania og við peningastovnar um garanti og aðrar orðingar í sáttmálanum, sum allir partar kunnu vera nøgdir við.

### Tikið longri tíð

Olaf Olsen sigur, at tað hevur tikið longri tíð enn væntað, men tað er ikki líkt til, at nakrir stórvegis trupulleikar stinga seg upp nú.

Talan er um tveir trolarar fyri fyrst, og reiðaríið hevur síðani ein møguleika í sáttmálanum um at byggja fleiri trolarar. Forkeypsrætturin tryggjar teimum møguleika at fáa fýra nýggjar trolarar afturat hesum báðum, um áhugi er fyri tí. Hesir trolararnir skulu loysa teir gomlu cuba-trolararnar av.

Cuba-trolararnir eru átta í tali, og avtalan við sponsku skipasmiðjuna er, at hon skal kunna veita Beta seks aðrar trolarar ístaðin fyri teir gomlu. Nýggju skipini vera 37 metrar til longdar og eru eini 460 bruttotons.

– Enn er avgerð ikki tikin, um vit fara at byggja fleiri enn tveir trolarar. Tá hesir báðir hava verið til fiskiskap í eitt ár ella so, taka vit avgerð, um fleiri skulu byggjast, sigur Olaf Olsen.

### Drúgvar fyrireikingar

Olaf Olsen greiðir frá, at teir fóru undir at kanna møguleikar at byggja nýtt skip fyri einum ári síðani, og teir komu fram til, at spanska skipasmiðjan var tann bíligasta.

– Fyrst kannaðu vit møguleikarnar fyri at keypa gamlar bátar, men tann loysnin var ikki nøktandi. Tí valdu vit at byggja nýtt, sigur Olaf.

Teir nýggju trolararnir fara at royna á somu leiðum sum cuba-trolararnir. Tað er undir Føroyum við tað føroyska markið, greiðir Olaf Olsen frá.

# Trygdartiltøk á ólavsøku

**Á ólavsøku í ár verður stórur dentur lagdur á at hava trygdartiltøk, um eitt óhapp skuldi komið fyri, so trygdin á ólavsøku er í lagi**



*Jan Christiansen, borgarstjóri, hevur tikið stig til trygdartiltøk á ólavsøku*

HEINI Í SKORINI
*ólavsøka*

Jan Christiansen, borgarstóri í Havn, hevur saman við øðrum á býráðnum lagt størri dent á trygdina á ólavsøku í ár samanborið við undanfarin ár.

- Tá vælkendi midnáttarsangurin er á skránni, eru millum 7000 og 10.000 fólk savnað í miðbýnum, og tá kann ein neyðstøða lættliga koma fyri, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

Jan Christiansen sigur, at tá so nógv fólk eru trunkað saman á so lítlum øki, er alneyðugt við trygdartiltøkum, og at serkøn fólk eru hjástødd, um eitt óhapp skuldi komið fyri.

- Vit ætla at hava sjúkrabilar til reiðar, og Reyði Krossur verður eisini til staðar. Tað hava vit til ólavsøkuna í ár mett at vera týdningarmikið, sigur borgarstjórin í Havn undan ólavsøkuni 2001.

Hóast vit ikki eru von við stór óhapp til slíkar hendingar her á landi, má hetta metast sum eitt sera skilagott tiltak hjá býráðnum. Tí tá nógv fólk koma saman er sera skjótt, at eitthvørt óvæntað skuldi komið fyri.

Úti í heimi síggja vit ofta, at vanlukkur henda til stór tiltøk so sum á Roskildefestivalinum og til fótbóltsdystir, og tískil eiga vit eisini at vera til reiðar á ólavsøku, so sum býráðið nú hevur fyriskipað.

# Karsten flytir umsiting til útjaðara

**Nýggja kolvetnisskattafyrisitingin fer ikki bara at liggja í Norðoyggjum, men eisini í Suðuroynni. Endamálið er at skapa trivnaðarmøguleikar í økjunum, sigur Karsten Hansen**

FYRISITING
*Stefan í Skorini*

Kolvetnisskattadeildin undir Toll- og Skattstovuni, sum fyri stuttum er sett á stovn, fer at vera bæði í Norðoyggjum og í Suðuroynni. Í gjár skrivaðu vit, at deildin fór at liggja í Klaksvík, men ein partur verður eisini í Suðuroynni.

Hetta boðar Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, frá í tíðindaskrivi.

– Tílík umsiting krevur útbúgvið fólk og kann saman við vinnuvirksemi skapa betri trivnaðarmøguleikar bæði í Suðuroy og í Norðoyggjum, sigur Karsten Hansen.

### Grunnar til Suðuroynna

Samstundis sum oljuskattadeildin skal til Suðuroyar og Klaksvíkar verður umsitingin av ymsum grunnum flutt úr Tórshavn til Suðuroyar. Tað eru Frítíðarlønarskipanin, Frítíðargrunnurin og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum skulu umsitast í Suðuroynni.

Landsstýrismaðurin metir, at tað at flyta kolvetnisskattafyrisitingina og umsitingina av almennum grunnum út um miðstaðarøkið er í samsvari við tilmælini í økismenningarálitinum og í samsvari við løgtingssamtyktina um, at virksemi av kolvetnisvinnu eisini skal vera í útjaðaranum.